### Upplýsið um støðuna

..t spurdu eisini, hvat hann heldur um herferðina, sum umhvørvisfelagsskapirnir føra móti Føroyum í hesum døgum.

Hann heldur, at vit skulu taka hetta púra rólig-a, um vit hava reint mjøl í posanum. Og hann leggur afturat: - Noreg hevur tað á sama hátt við hvalaveiðuni. Men her kundi tú hildið, at Føroyar og Grønland høvdu lættari við at treingja ígjøgnum við boðskapinum um, at hesar útsettu smátjóðir hava ein lívsneyðugan tørv fyri at kunnu heysta náttúrutilfeingið.

### Onkar frekar ætlanir

Tað var meðan Uffe Ellemann-Jensen var uttanríkisráðharri, at vit tóku yvir undirgrundina sum málsøki. Nógv hevur verið tosað um og givið, hví hetta hendi so bráðliga. Onkur hevur ført fram, at undirgrundin gjørdist føroysk, tí at eitt nú Uffe Ellemann-Jensen hevði lagt onkran snildisliga taktikk. Nettup at teir høvdu mistanka um, at búskaparligu viðurskiftini í Føroyum fóru at versna so munandi, at Danmark noyddist at veita trygd fyri Føroyar. Og fyri at Danmark kundi hava eina rímiliga trygd, fingu Føroyar undirgrundina.

Tað verður tosa um, at A. P. Møller ella aðrar danskar fyritøkur standa klárar at gera kanningar, og at politisku myndugleikarnir hava givið grønt ljós. Í hvussu stóran mun heldur tú, at danskar fyritøkur eiga at verða við í hesum arbeiði?

### Danir mugu fáa fyrimun...

Hesa frágreiðingina heldur Uffe Ellemann-Jensen lítið um. Har er als einki samanhang við veruleikan. Einasta orsøkin til hatta, var sterka føroyski ynskið um at taka yvur málsøkið.

Men tá hugsað verður um framtíðina, sigur Ellemann-Jensen at enda - so vil eg bart út siga, at tað verður trupult fyri okkum at skilja, um danir ikki fáa fyrimunir í oljuvinnuni.

Tit kunnu ikki bara koma til okkara tá rokningarnar skulu gjaldast. .

**jan/eli**

*Ellemann-Jensen:*

**»Danmark hevur ongan annan at senda rokningina til«**



*Hugnaliga Invercauld Arms-hotellið í Braemar*

# Stórur spenningur um skotlandsferðina

*Møng bíða í spenningi eftir at frætta hvør høvuðsvinnarin verður í kappingini **»15 spurningar um Skotland«**, sum verið hevur í Sosialinum seinastu dagarnar. Fimtandi og seinasti spurningur er aðrastaðni í blaðnum í dag saman við áheitan á lesararnar um avgjørt beinanvegin at senda okkum svaraðu spurningarnar.*

Drigið verður mándagin 4 okt. – og tað fyrsta vit kunnu fáa vinnaranøvn í blaðið er sjálvsagt týsdagin 5. okt.



*Hotel Douglas í Aberdeen*

### Høvudsvinningurin

10-daga ferðin fyri tvey vaksin við tveimum børnum og bili umframt uppihald á trimum av hugnaligastu hotellum Skotlands, sum slagið stendur um 4. okt., er í stuttum henda:

– Fráferð við Smyrli hósdag kl. 15 og koma til Aberdeen fríggjadag kl. 14.

Gist verður tvær tær fyrstu næturnar á tí stak hugnaliga Douglas-hotellinum, sum er skamt frá atløguplássinum hjá Smyrli. Hetta er í miðbýnum, so væl liggur fyri at fara til handils, líkamikið hvørjum leitað verður eftir. At Aberdeen harttil er ein ógvuliga spennandi og hugnaligur býur, ger støðgin har bara so mikið forkunnugari.

Næstu fýra næturnar frá sunnudagi til og við mikudag, verður gist á Crieff Hydro Hotel í nánd av Crieff í náttúruvøkrum øki vestanfyri Perth. Gistingarhúsið er veruligt fyrsta floks luksushotell við øllum hugsandi hentleikum og ógvuliga vælhóskandi fyri húski við børnum.



*Stásiliga Crieff Hydro-hotellið*

Seinastu tvær næturnar undan heimferðini, hósdag og fríggjadag, verður gist á stásiliga Invercauld Arms Hotel Í Braemar, uml. ein tíma við bili frá Aberdeen.

Íroknað gistingarnar á hesum fráliku hotellum er morgunmatur og døgurði fyri øll – hvønn dag.

Hvørji, ið sleppa til Skotlands at dusa sær á hesum fráliku hotellum, kunngera vit saman við hinum vinnarunum týsdagin 5. okt.

## KAPPINGIN 15 SPURNINGAR UM SKOTLAND

## ER NÚ LIÐUG

**Seinasti spurningurin...**



**15. Spurningur**

Er skotska láglendið fyri sunnan ella norðan?

Svar ___________

Fyri at vera við í lutakastinum um

**10-DAGA SKOTLANDSFERÐ**

við bili & børnum undir 14 ár og uppihaldi á trimum fráliku skotskum hotellum í eina viku

**2 SNARFERÐIR FYRI TVEY**

til Aberdeen

**10 SKOTSK TURRIKLØÐ**

og **4 SWEAT SHIRTS**

skuldu tit bert svara 15 spurningum um Skotland. Spurningarnir hava verið í blaðnum dag um dag og tann seinasti er í blaðnum í dag.

Greinin á síðu 16 & 17 í hósdagsblaðnum 9. sept. hjálpir tykkum at svara spurningunum.

**STRAX – STRAX – STRAX**

Sendið beinanvegin teir 15 svaraðu spurningarnar til

**SOSIALURIN, Box 76, 110 Tórshavn**

við sendaranavni, bústaði og tlf. nr.

**Bert 15 svaraðar spurningar í hvønn bjálvan.** Eru fleiri í einum húski, ið senda inn, mugu tey nýta hvør sín bjálva.

**Drigið verður mánadagin 4. okt.**

Bjálvar til dráttin mugu tí vera okkum í hendi í **SEINASTA LAGI við postinum mánamorgunin 4. okt.**

Latið ikki vikuskiftið fara, men sendið okkum kappingarbjálvan so skjótt 15. spurningur er svaraður.